## EG MEINI TAÐ

# Helvitis einglakór



*Niels Uni Dam skrivar:*

Vemmiligt at síggja hatta vælnøgda snýðið á Álvi Kirke, eftir at hann hevði framt eina ta mest ókristiligu og ljótu gerð ímóti mannaættini, sum vit hava sæð her á klettunum.

Løgið, sum tað altíð eru tey, sum njóta best av tali- og trúarfrælsinum, sum hava størst trupulleika av, at onnur hava sama frælsi.

Orsøkin til, at Álvur sá so vælnøgdur út aftaná hesa ljótu gerð, var ivaleyst ikki, at Álvur er eitt ringt fólk. Eg ivist ikki í, at Álvur veruliga heldur, at hann er tænari Guds. Tað er tíverri so, at nógvir av harðrendastu búrkroppunum upp ígjøgnum tíðirnar hava hildið seg verið tænarar Guðs. Hetta eru svøk fólk, sum hefta seg við eitt lítið brot í Bíbliuni og liva júst hetta brot.

Lat tað vera sagt beinanvegin, at skulu vit liva eftir Bíbliuni beint sum hon er skrivað, so skal samfelagið gerast umfevnandi um. Til dømis verður tað at hava samkynta samlegu sett sum verandi ein deyðssynd á sama støði sum um ein pápi sær son sín naknan. Eg hevði mín ársgamla son í bað ígjár, og fyri stuttum var eg í svimjihøllini við eldra soninum - nær fer Álvur at savna inn undirskriftir móti hesum deyðssyndum?

Tað er Álvur sjálvur, sum ger av um hann vil liva sum samkyntur ella hinkyntur. Men í einum landi, har persónligt frælsi er lógartryggjaður rættur, sleppur Álvur bert at gera hetta av fyri seg sjálvan.

Ja, og hvat rakar tað Álv, hvussu restin av okkum liva? So leingi sum vit ikki gera skaða á onnur, so eiga vit at sleppa at liva sum okkum lystir.

Tað er ein brotsgerð ímóti mannaættini at forfylgja fólki fyri teirra trúgv, húðalit ella kynsligheit. Tað sum Álvur og 2.500 onnur fólk hava gjørt, er at skriva undir uppá, at onnur ikki hava rætt at liva undir somu rættarkorum sum restin av okkum.

Hetta er so vemmiligt, at eg havi hug at gráta. Hetta er so ókristiligt, at Jesus grætur. Hetta er so galið, at tey sum hava undirskrivað áttu at biðið tey samkyntu um umbering.

Álvur og hansara fólk hoyra til tey mest andaliga víðgongdu í samfelagnum. Eftir mínari metan eru tey so ekstrem, at fornuftin langt síðan er rokin. Men tey eiga at sleppa at liva sum tey vilja, og siga tað tey vilja, so leingi sum tað ikki gongur út yvir nakran annan. Hví skulu tey so verða tey fyrstu at leggja eftir frælsinum hjá øðrum at liva sum tey ynskja?

Hetta er at fara longur enn talifrælsi loyvir, hetta gongur útyvir onnur.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo

Blaðstjórn: Turið Kjølbro

# Kvinnufylking, Lollipops og stjørnuskot Sambandsfloksins

## Nakrar hendingar, ið fóru fram fyri 25 árum síðani – í 1977

AFTURHVARV

*Eirikur Lindenskov*

Í mars 1977 skipaði Kvinnufylkingin fyri mótmælisfundi á Vaglinum í Havn.

Endamálið við fundinum var at lýsa støðu kvinnunnar í samfelagnum og annars at vísa á ymiskar skeivleikar, sum eftir hugsan Kvinnufylkingsins okkurt mátti gerast við.

Eitt av hesum málum var at bøta um korini hjá kvinnuni á arbeiðsmarknaðinum, líkaløn, avtøku av samskattingini, fleiri barnagarðar og vøggustovur o. s. fr.

Á síggjast kvinnurnar, tá tær eru á veg oman á Vaglið, har fleiri røður vóru hildnar.




*Kvinnufylkingin í mótmælisgongu oman eftir Niels Finsensgøtu í Havn á kvinnudegnum í 1977*

### Lollipops á vitjan

Í juni í 1977 vitjaði kendi danski poppbólkurin, Lollipops í Føroyum. Bólkurin hevði tvær væleydnaðar konsertir í Ítróttarhøllini í Havn. Tað vóru teir tríggir, Henrik Lund og brøðurnir Torben og Jørgen Lundgreen, ið myndaðu Lollipops.

Teir byrjaðu fyrst í sekstiárunum, 10-11 ára gamli, at syngja og spæla saman, og gjørdust longu tá kendir í norðanlondum.

Lollipops hevur, umframt í teim skandinavisku londunum, eisini verið konsertferðir í Vesturtýsklandi, Belgia, Luxemburg, Hollandi, Fraklandi og Íslandi

### Pauli Ellefsen fær fótin fastan

Á fólkatingsvalinum 1. mars í 1977 hendi eitt skifti í føroyskum politikki. Erlendur Patursson, sum varð valdur á fólkating í 1973 og 1975 fall fyri nýggja stjørnuskotinum hjá Sambandsflokkinum, Paula Ellefsen, sum eisini setti atkvøðumet við 3.581 persónligum atkvøðum.

Jóhan Nielsen úr Javnaðarflokkinum varð afturvaldur við 2479 atkvøðum. Sambandsflokkurin fekk 5173 atkvøður og gekk 1960 atkvøður fram.

Javnaðarflokkurin fekk 3680 atkvøður, hann misti 424, og Tjóðveldisflokkurin fekk 3062, hann misti 490 atkøvður.

Fólkaflokkurin fekk við hetta valið 2771 atkvøður, Sjálvstýrisflokkurin 551 og Framburðsflokkurin 207 atkvøður.

*Kelda: Árið ið fór 1977*



*Nýggja stjørnuskotið hjá Sambandsflokkinum, Pauli Ellefsen, vann sær sjálvum og flokkinum stórsigur á fólkatingsvalinum 1. mars 1977*



*Torben Lundgreen úr Lollipops á konsertini í Ítróttarhøllini í juni 1977*



# Har ræstur fiskur er veitslumatur

## At ræstur fiskur er veitslumatur hjá summum sást, tá Føroyingafelagið í Mið- og Vesturjútlandi fyri trimum vikum síðani skipaði fyri veitslu



*Vestmenningurin Poul og sumbingurin Páll leggja uppúr*



*Kassameistarin Hjalti úr Oyndarfirði var væl nøgdur við ta góðu undirtøkuna*

VEITSLULAG

*Árni Joensen*

Hóast flestu føroyingum dámar ræstan fisk, man tað vera sjáldan, at eitt ræst sporl liggur fremst á bakkanum á veitsluborði í Føroyum. Tað sama kann fyri tann skyld sigast um garnatálgina og spikið. Í dag munnu kotelettin og kjøtfrikadellan hava skumpað tann ræsta fiskin av borðinum í flestu heimum, og tann brúna ella okkurt fremmant sósaslag hevur á sama hátt loyst garnatálgina av. Vandin fyri at fáa karm av at reinsa skarngarnarnar er heldur ikki tann sami í dag, nú flestu skarngarnarnar enda í einum ruskposa ella í einari bingju. Spikið hevur hóast alt tosið um kyksilvur og heilakanningar á Harward varðveitt eitt sindur meiri av sínari støðu, men tað man vera grindini fyri at takka.

Tey, sum ganga undir heitinum útisetar, eru av góðum grundum farin uppaftur longur burtur frá teimum "gomlu" føroysku matvanunum. Ræstar greipur, garnatálg og spik eru ikki at finna í kølidiskunum í Bilka, Føtex ella Kvickly, og svínaoksakjøt og høsnakjøt munnu vera tað, sum dagliga kemur á borðið í útisetaheimunum. Einki ilt at siga um tað, tí tað fær valla verið ørvísið. Og so slepst heldur ikki undan tí veruleika, at tann rami ræsti roykurin er ikki júst tað, sum fellur útlendsku nasunum best, skuldi ein verið so heppin at fingið nakrar greipur sendandi úr Føroyum.

### Rætti roykurin

At ræsti fiskurin er í hásæti millum útisetar sást týðiliga, tá føroyingafelagið í Mið- og Vesturjútlandi herfyri skipaði fyri veitslu, har borðreitt varð við røstum fiski, garnatálg og spiki. Tað er einki yvir at dylja, at tað kendist bæði heimligt og forkunnugt ísenn at kenna tann ræsta royking í teirri donsku heystarluftini, og hóast ein ikki var staðkendur, var eingin trupulleiki at finna veitslustaðið. Tað ráddi bert um at ganga eftir roykinum.

Her var eingin roykur av eysturlendskum kryddurtum ella amerikanskum fast food, men tann rami føroyski ræsti roykurin. Tað sást eisini á gestunum, at tey gleddu seg. Summi settu nasarnar upp í ættina úti í túninum, andaðu djúpt og vildu mest sum ikki lata luftina sleppa útaftur. Innanfyri sótu onnur og bíðaðu eftir, at maturin kom á borðið.

Í køkinum á eftirskúlanum, har veitslan var, stákaðust nevndarlimirnir í felagnum og onnur við døgurðan. Tær stóru grýturnar stóðu útiá við fiski, aðrar við eplum, og í einari av teimum minnu grýtunum brásaði garnatálgin. Onkur var millum gestirnar, sum ikki legði so nógv í ræsta fiskin, so í ovninum stóð onkur steikin at borðreiða fyri teimum, hvørs magi og sodningarevni



kanska ikki vóru brynjað til tann serføroyska døgurðan.

Tá farið varð til borðs, vórðu gestirnir kunnaðir um, at nóg mikið var til, og hóast kokkarnir ikki høvdu verið sparnir, tá teir høvdu lagt uppúr, var tað kortini eyðsýnt, at fólk settu sær fyri at fáa mettuna. Fiskurin vísti seg at vera óføra góður. Hann var nú ikki føroyskur, men felagið hevði fingið hann frá onkrum sjómanni í Hanstholm, sum hevði ræsað hann umborð. Ella sum onkur helt fyri: Fullveldi ella ikki, sjórokið í Norðsjónum ger í hvussu er somu nyttuna sum sjórokið undir Føroyum. Garnatálgin gjørdi sum altíð undurverkið, og hon var í hvussu er føroysk. Somuleiðis spikið.

### Í essinum

Tann danski durasnapsurin kom sum altíð væl við, tá ræst verður etið, og hýrurin við borðið var eisini óføra góður. Sum altíð á slíkum útisetaveitslum varð dúgliga sungið. Kom okkurt, sum líktist einum kvæða- ella vísulagi, tóku fólk í hondina hvør á øðrum, og tey fægstu mundu gáa eftir snikinum á fingrunum á honum ella henni, sum undir liðini sat. Tað var ikki sørt, at hesin borðsiðurin hetta kvøldið minti um borðsiðin hjá okkara gomlu norrønu forfedrum, soleiðis sum vit hava sæð tað í filmi ella aðrastaðni. Hugtakið hygieina var ikki tað, sum lá fremst í huganum eina slíka løtu. Hetta var føroyingurin í tí rætta essinum.

Aftan á borðhaldið varð farið aftur til nútíðina, tá Eiler og Hallur við teirra vinmonnum spældu til dans. Tó so, onkur vísan var uppímillum. Stundir vóru eisini til at práta um leyst og fast, men kanska minst um veður og vind, sum annars sigst liggja fremst hjá okkum føroyingum, men veðurlagið á flatlondum er nú heldur ikki tað sama sum heima.

At fólk vóru fegin og væl nøgd um kvøldið sást ivaleyst best á tí góða huginum til dansin, sum gekk lystiliga langt út á náttina. Tá fór at tynnast, tí summi mundu hava langt til húsa. Øðrum nýttist bert at fara í kjallaran, tí har hevði felagið útvegað avstaðsfólkinum song. Og tað mundi koma væl við.

Eitt var semja um: Ræstur fiskur er væl egnaður sum veitslumatur.

Føroyingafelagið í Mið- og Vesturjútlandi umfatar Viborg Amt og Amt. Felagið varð stovnað í 1994, og limatalið skiftir millum 60 og 80. Felagið skipar fyri tveimum veitslum um árið, einari um heystið og einari um várið umframt jólatiltaki og øðrum tiltøkum. Í nevndini í felagnum sita Poul Poulsen, formaður, Mary Ann Joensen, næstformaður, Hjalti Joensen, kassameistari og skrivari, Inga Ludvig, Bjarna Haraldsen og Hannemia Jensen.